# dreymajobb



*Hanus á Gørðum er settur í starv í Norðoyggjum. Her avmyndaður millum Bjarna Bæk, fráfarandi dómpróst og Jógvan Fríðriksso, bisp*

*(Mynd: Klaksvíkar kommuna)*

## Prestatúrur til Nólsoyar

Í dag er støðan hon, at nógvir lutvíst yngri prestar eru í størvum í útjaðarinum, t.d. Eiði og Vági, men í dag eru viðurskiftini at ferðast oyggjanna millum so góð, at tað slepst fram og aftur sama dag á flestu støðum.

Soleiðis er tað í roynd og veru eingin forðing fyri at verða prestur á Viðareiði, Sandoy ella Eiði og kunna luttaka við virksemi á øðrum støðum. Hetta sæst serliga aftur í føstuni, tá føstugudstænastur verða hildnar kring alt landið:

Her ber til hjá prestinum á Sandoy at hava eina gudstænastu í Gásadali, Árnafirði ella við Gjógv og verða aftur sama kvøld. Øvugt ber eisini til hjá Viðareiðisprestí at hava føstugudstænastu í Sørvági, Dali ella Selatrað og vera við hús sama kvøld.

Dømi eru eisini um prestar sum hava undirvíst ella hava staðið fyri kórum á øðrum staði enn tí, har teir búðu, tí tað er so lætt og einfalt at ferðast í dag.

Í øðrum føri hava prestarnir í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi eisini Nólsoy sum sína kirkju. Her ber til hjá teimum at fara við Rituni sunnumorgun og hava bæði gudstænastu og húsvitjan seinnapartin, áðrenn leiðin verður løgd aftur til Havn. Á mannamáli verður hesin morguntúrurin sunnudag ofta nevndur "prestatúrurin".

### Búgva á staðnum

Ein viðkomandi spurningur hjá einum presti, ið kundi hugsað sær annað starv, er møguleikarnir fyri búseting.

Í lýsingunum eftir presti stóð tilskilað, um tænastubústaður fylgdi við ella ikki. Í onkrari av lýsingunum, har prestagarður stendur tøkur, varð beinleiðis sagt, at presturin hevur skyldu at búgva í prestagarðinum.

Her fær prestur altso tillutað ein prestagarð, har hesin og húski hansara kunnu flyta inn og liva undir góðum umstøðum.

Í teimum settu størvunum varð greitt, at fyri prestastørvini t.d. á Strondum, Kvívík og Klaksvík fylgdi bústaður við, - ávikavist á Gjaranesi, Kirkjuteigi og á Brekku 5.

Men hetta sama ger seg ikki galdandi t.d. fyri starvið sum sóknarprestur við Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi. Her verður neyðugt hjá Derhardi Olsen at útvega sær bústað sjálvur.

Hann og konan hava eitt grundøki í Havn, og er ætlanin at búseta seg her.

### Hugskot

Eitt er tað, at øll tey lýstu størvini eru sett. Ein annar spurningur er, at talan í flestu førum eru um ungar menn og kvinnur sum hava fingið hesi størvini.

Miðalaldurin á teimum nýggju prestunum er ikki serliga høgur, og tí er ikki óhugsandi, at hesir prestarnir fara at verða – ella kunnu verða – í størvunum í mong ár aftrat, kanska restina av tænastutíð teirra.

Um hetta eru helst ymsar meiningar, men ein sannroynd man vera, at tað altíð er trupult hjá einum kirkjuliði at skula av við ein prest – yngri sum eldri – og sum tey hava verið sera fegin um.

Tað eru tey sum halda, at ein ungur prestur ikki skal byrja tænastu sína í einum fólkaríkum øki, prestagjaldi ella býi, har hesin veruliga kann fáa sett fleiri av hugskotum og ætlanum sínum í verk.

Hinvegin so eigur ein prestur ongatíð at gloyma, at hann fyrst og fremst skal røkja tær tænasturnar sum hoyra kirkjuni og kirkjuliðinum til, men at hesin eftir umstøðunum eisini ger húsvitjanir, skipar fyri serstøkum gudstænastum, skeiðum og annað.

Tað eru eisini tey ið - av røttum ella órøttum – halda, at fleiri av prestastørvunum í útjaðarinum eru meiri ætlað prestum, sum eru komnir nakað upp í árini og sum vilja vera í hesum starvinum til teir fara frá fyri aldur.

Í øllum førum kann staðfestast, at miðalaldurin á føroysku prestunum er lækkaður munandi henda seinasta mánaðin.



*Uni Næs er dómpróstur Føroya*



*Símun P. Jacobsen er settur í starvið í Sjóvar prestagjaldi*





*Theodor E. D. Olsen verður innsettur sum prestur komandi sunnudag*